**Álit**

**í**

**løgtingsmáli nr. 187/2011: Uppskot til samtyktar um játtanarkarmar á løgtingsfíggjarlógini fyri 2013**

Landsstýrið hevur lagt málið fram tann 30. mars 2012, og eftir 1. viðgerð 10. apríl er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundum tann 12., 16., 18., 19., 23., og 26. apríl 2012.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Landsbankan, landsstýrismenninar í vinnu-, innlendis-, mentanar-, almanna- og fíggjarmálum.

Fíggjarnevndin vísir á, at hetta er 3. árið, landsstýrið leggur fram uppskot til karmar. Tað, at leggja fram karmar, er samsvarandi nýggju játtanarskipanini, sum á vári 2010 varð samtykt av einum nærum samdum Løgtingi, aftan á eitt uppskot, framlagt av formannsskapi Løgtingsins eftir umbøn frá landsstýrismanninum í fíggjarmálum.

Tað tykist tó ikki, sum full semja er enn um endaliga formin.

Tað hevur verður reistur ivi um, hvussu rætt tað er at gera eina nágreiniliga frágreiðing um, hvørji tiltøk, landsstýrið ætlar at fremja, tá flestu tiltøkini, sum umtalað verða, ikki eru liðugt gjøgnum arbeitt. Ivi er eisini um, hvat tað er, sum Løgtingið samtykkir,

- samtykkir Løgtingið at gjøgnumføra øll tey tiltøk, sum umtalað eru?
- tá tiltøk krevja lógarbroyting, hevur so Løgtingið politiskt bundið seg til at fremja eina lóggávu, sum Løgtingið enn ikki hevur sæð?

Grundin til, at valt varð at fara frá gomlu mannagongdini at gera fíggjarlóg, gongur fram av álitinum, ið varð gjørt í sambandi við nýggju játtanarlógina. Har stendur ma.:

"Hóast málið er at fáa politiska semju um fíggjarlógaruppskotið um miðjan juni, hevur í royndum ikki eydnast at fáa semju fyrr enn í seinnu helvt av september, stutt áðrenn fíggjarlógaruppskotið skal verða lagt fyri Løgtingið.
Fíggjarlógarsamráðingarnar fara ikki bara fram millum teir einstøku samgonguflokkarnar. Tað er eisini ein togan um raðfestingar millum ymsu málsøkini.

Tað er ikki sjáldan, at samráðingarnar hava lyndi til at gerast eitt stríð um, hvussu stóran part, hvør landsstýrismaður skal fáa til sín av heildarkarminum, og í minni mun snúgva seg um, hvussu tey ymsu virkisøkini skulu raðfestast, eitt nú almanna-, skúla- og vinnumál.
Avleiðingin er, at tá ið líður út í septembermánað, er í mongum førum ov seint at gera avtalur um raðfestingar og fullnýtslu, ið skulu galda fyri komandi fíggjarár, og tær avtalur, ið verða gjørdar, eru mangan treytaðar av, at eitt lógaruppskot verður gjørt. Hesar avtalurnar um lógarbroytingar verða í fleiri førum ikki settar í verk annaðhvørt, tí at stundir ikki eru at gera lógaruppskotini ella tí, at tá ið lógaruppskotini liggja fyri, kemur í ljósmála, at meiriluti kortini ikki er fyri teimum.
....
Vansin er sostatt politiskur, ikki tøkniligur. Í politisku viðgerðartilgongdini er ikki rúm, soleiðis sum mannagongdirnar nú eru, at gera arbeiðið við fíggjarlógaruppskotinum til lítar, soleiðis at ein "røtt" og gjøgnumskygd fíggjarlóg spyrst burturúr."

Tað tykist, at tann ósemja, sum fyrr var við fíggjarlógarviðgerðini um heystið, nú er flutt fram til várið í samband við karmarnar. Sum onkur landsstýrismaður málbar seg á tingi, at nú hevur man fingið tvær fíggjarlógarviðgerðir um árið.

Fyri at loysa táverandi trupulleika við fíggjarlógarviðgerðini, varð í álitinum mælt til: "*at fíggjarlógartilgongdin verður býtt í tveir partar soleiðis, at karmarnir um málsøkini verða settir í einari tilgongd fyri seg og tann nágreiniliga ætlanargerðin og arbeiðið við sjálvum fíggjarlógaruppskotinum fer fram í einari aðrari.*"

Sostatt er einki, sum talar fyri eini nágreiniligari frágreiðing frá landsstýrinum í sambandi við fíggjarkarmarnar um júst, hvussu landsstýrið ítøkiliga ætlar at brúka játtanirnar, tí hetta er partur av fíggjarlógarviðgerðini.

Tað verður ført fram, at tað ber ikki til at leggja karmar fram uttan at geiða frá, hvussu landsstýrismenn, hvør fyri sítt øki, ætla at nýta tillutaðan karm ítøkilia.

Hetta átti tó ikki at verið neyðugt, tí sum tað stendur í álitinum "Uppskotið til samtyktar skal verða gjørt við støði í tølunum fyri mett ætlanarár í galdandi fíggjarlóg við tøkniligum broytingum, ið kunnu standast av prís- og lønargongdini, og annars verða grundað á búskaparligu útlitini fyri komandi ár." Sostatt hava landsstýrismenn nágreiniliga greitt frá í fíggjarlógaruppskotinum 2012, hvussu teir ætla at reka hvør sítt øki fyri 2013. Hetta er innanfyri teir karmar, sum Løgtingið ásetti á vári 2011.

Fíggjarlógin hevur tvey ætlanarár, so eins og 2013 er nágreinað í fíggjarlógini 2012, so er eisini 2014.

Tað, sum var ætlað við búskaparfrágreiðingini, var, at

> "Til skjalfestingar skal ein Búskaparfrágreiðing I verða gjørd. Útgreiningin eigur at lýsa makro-búskaparliga grundarlagið undir búskaparpolitikkinum. Framskrivingar eiga at verða gjørdar fyri 5 ár og lýsa búskaparligu gongdina á ávísum økjum serliga væl.
>
> Somuleiðis eigur útgreiningin at vísa karmarnar um málsøkini hesi næstu fimm árini.
>
> Umráðandi er, at Búskaparfrágreiðing I fevnir um eina makro-búskaparliga lýsing og meting av landsins búskapi yvirhøvur og serliga um støðuna hjá tí almenna. Tað er sostatt umvarðandi, at kommunurnar eisini verða tiknar við í hesa lýsing, tí fíggjarlógin og fíggjarviðurskiftini hjá kommununum ávirka og eru bundin hvørt av øðrum. "

Búskaparfrágreiðingin eigur sostatt at verða grundarlagið fyri, at spurningurin "hvat hava vit ráð til" kann svarast og harvið grundalagið undir karmunum, sum er býtt út á greinar (landsstýrismannaøki)

Tað tykist tí ikki at verða neyðugt í frágreiðingini at greiða frá, hvussu føroyski búskapin hevur gingist seinastu árini. Í staðin átti at verið ein frágreiðing um, hvussu gongdin í føroyska búskapinum verður frameftir.

Ikki fyrr enn karmarnir eru samtyktir av Løgtinginum, eiga landsstýrismenn at greina meira ítøkiliga, hvussu teir ætla at reka sítt øki. Hetta er ásett í játtanarlógini í § 8,3:
" *Stk. 3. Hvør landsstýrismaður ger innan fyri tillutaða játtanarkarmin sín part av fíggjarlógaruppskotinum.* "

Hetta er grundgevingin fyri, hví Fíggjarnevndin í sínum áliti til karmar higartil hevur valt at gera eitt býti ikki bara upp á greinar, men eisini øll 5 árini, sum karmarnir umfata. Tí hvussu skulu landsstýrismenn gera "innan fyri tillutaða játtanarkarmin sín part av fíggjarlógaruppskotinum", um ikki Løgtingið hevur samtykt ein játtanarkarm eisini fyri ætlanarárini.

Fíggjarlógaruppskotið umfatar umframt sjálvt fíggjarárið, har játtanin verður ásett í lóg, eisini fleiri ár frameftir. Talið hevur fíggjarmálaráðið ásett til 2 ár.

Hetta er eisini í samsvari við avgerð Landsstýrismannanevndinarinnar frá 11. mars í 2011, tá hon staðfesti, at:

"§ 11, stk. 2 í játtanarlógini er soljóðandi:
"Stk. 2. Inntøkur og útreiðslur verða vístar í fleiriárs yvirlitum, sum fevna um síðstu roknskapirnar, fíggjarlóg, fíggjarlógaruppskotið og veruligar fíggjarætlanir fyri fylgjandi fíggjarár."

Serligu viðmerkingarnar til hesa grein í løgtingsmáli 81/2005 eru soljóðandi:
" Í § 11, stk. 2 verður skotið upp, at inntøkur og útreiðslur koma fram í fleirársyvirlitum (roknskapur, fíggjarlóg, fíggjarlógaruppskot og harumframt realistiskar fíggjarætlanir fyri eftirfylgjandi ár. Tað er ætlanin, at fleiriársyvirlitið verður prístalsjavnað (uppskotsárið)."

Eftir orðaljóðinum í greinini: "veruligar fíggjarætlanir fyri fylgjandi fíggjarár" er Landsstýrismálanevndin ikki í iva um, at hetta skal skiljast sum fleiri fylgjandi fíggjarár, og í minsta lagi 2 fylgjandi fíggjarár. Hetta verður eisini staðfest í viðmerkingunum, sum vísa á, at fíggjarlógaruppskotið skal innihalda realistiskar fíggjarætlanir fyri eftirfylgjandi ár. "

Í veruleikanum varð árið 2013 ikki ásett í fíggjarlógaruppskotinum 2012. Víst varð til, at tíð var ikki hjá Fíggjarmálaráðnum at fáa hetta gjørt, tí at valið kom fyri.
Heldur ikki fyri fíggjarlógina 2011 varð hetta gjørt, og var tað ein partur av omanfyri nevndu kæru til landsstýrismálanevndina. Men tað má væntast, at hetta at verður gjørt frameftir.

Mint verður tó á, at: "Formliga bindandi játtanarskeiðið er framvegis eitt ár, men ætlanin er tann, at fleirára fíggjarætlanir skulu verða fataðar sum bindandi. Tað merkir ikki, at einki kann verða broytt, men at broytingarnar eiga at verða grundaðar á broyttar fortreytir."

Framskrivingar av føroyska búskapinum øllum ikki bara landskassaútreiðslum eigur at verða grundarlagið undir budgetteringini. Tá framskrivingin fyri komandi fimm árini so er upp á pláss, eigur landsstýrið at koma við yvirskipaðum boðum uppá, hvør politikur skal fremjast fyri at møta teimum avbjóðingum, ið samfelagið hevur, best møguligt.

Tað er munur á fíggjarkarmum og fíggjarlóg. Tað er tí eftir meting Fíggjarnevndarinnar onki, sum talar fyri at tað í fíggjarmarmunum verður nágreinað í smálutir, hvat ætlanin er at fremja komandi 5 árini. Hinvegin eigur landsstýrið ístaðin at lýsa yvirskipaðu ætlanirnar.

Annars hevur nevndin undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

**Meirilutin** (Bárður Nielsen, Jákup Mikkelsen, Rodmundur Nielsen og Bill Justinussen) hevur í síni viðgerð av málinum ikki tikið støðu ella viðgjørt tey uppskot um tiltøk, ið nevnd eru í búskaparfrágreiðingini, og ei heldur býti av karmum innan hvørja grein sær.

Meirilutin hevur bert viðgjørt tær yvirskipaðu karmarnar. Meirilutin er við m.a. støði í nýtsluni fyri seinastu árini og við samskifti við landsstýrismenn, sum hava verið á fundi í nevndini, fullvís í, at tað ber væl til hjá landsstýrinum at reka eitt vælvirkandi vælferðarsamfelag innan teir karmar, sum eru lagdir fyri Løgtingið.

Meirilutin heldur fast við siðvenjuna, sum hevur verið í Fíggjanevndini, at karmarnir skulu samtykkjast fyri øll 5 árini, býtt upp á greinar. Annars fáa landsstýrismenn ikki gjørt uppskot til fíggjarlóg inann givnar karmar, eins og játtanarlógin ásetir.

Við hesum viðmerkingum setir meirilutin fram soljóðandi:

**b r o y t i n g u p p s k o t**

Við hesi løgtingssamtykt tekur Løgtingið undir við, at samlaði útreiðslukarmurin á løgtingsfíggjarlógini fyri 2013 verður 4.719,2 mió. kr. Rakstrarkarmurin er 4.420,6 mió. kr., og løgukarmurin er 298,6 mió. kr. Samlaði inntøkukarmurin verður 4.469,7 mió. kr.

Í talvuni niðanfyri eru samlaðu játtanarkarmarnir býttir á greinar og ár.

(Upphæddirnar í talvuni eru í føstum prísum. Tað merkir, at í tann mun, at prís- og lønarvøkstur er í samfelagnum, broytast upphæddirnar samsvarandi.)

| **Játtanarkarmar á løgtingsfíggjarlógini fyri 2013** | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | |
| *Mió. Kr.* | **2013** | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** |
| *Rakstur* | | | | | |
| § 1 Løgtingið | 44,6 | 45,0 | 46,0 | 47,0 | 45,5 |
| § 2 Løgmansfyrisitingin | 46,8 | 46,3 | 46,3 | 44,9 | 44,5 |
| § 3 Fíggjarmál | 289,3 | 283,8 | 277,5 | 273,8 | 270,2 |
| § 5 Fiskivinnumál | 149,9 | 147,2 | 145,3 | 143,5 | 142,1 |
| § 6 Vinnumál | 292,1 | 285,1 | 283,0 | 283,0 | 283,0 |
| § 7 Mentamál | 930,8 | 919,0 | 916,2 | 913,4 | 912,3 |
| § 11 Heilsumál | 907,7 | 896,9 | 890,2 | 884,4 | 880,4 |
| § 12 Almannamál | 1.656,3 | 1.682,8 | 1.653,7 | 1.669,3 | 1.650,1 |
| § 15 Innlendismál | 103,1 | 101,3 | 101,8 | 98,9 | 98,8 |
| | 4.420,6 | 4.407,5 | 4.360,1 | 4.358,2 | 4.326,7 |
| *Løgur* | | | | | |
| § 2 Løgmansfyrisitingin | 3,0 | 3,0 | 3,0 | 3,0 | 3,0 |
| § 3 Fíggjarmál | - | - | - | - | - |
| § 5 Fiskivinnumál | - | - | - | - | 85,0 |
| § 6 Vinnumál | 24,5 | 21,4 | 34,5 | 1,0 | 10,0 |
| § 7 Mentamál | 107,0 | 107,0 | 109,0 | 69,0 | 13,5 |
| § 11 Heilsumál | 49,8 | 54,0 | 40,0 | 95,0 | 69,0 |
| § 12 Almannamál | 46,7 | 15,8 | 19,3 | 18,5 | 8,5 |
| § 15 Innlendismál | 67,6 | 98,6 | 92,1 | 109,4 | 110,9 |
| | 298,6 | 299,8 | 297,9 | 295,9 | 299,9 |
| | | | | | |
| **Útreiðslukarmur** | **4.719,2** | **4.707,3** | **4.657,9** | **4.654,1** | **4.626,6** |
| | | | | | |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| § 20 Inntøkur | 4.469,7 | 4.552,7 | 4.610,7 | 4.670,7 | 4.730,7 |
| | | | | | |
| **RLÚ-úrslit** | **-249,5** | **-154,6** | **-47,2** | **16,6** | **104,0** |

Viðmerkingar:
Uppskotið er somu karmar, sum landsstýrið hevur lagt fyri tingið. Broytingaruppskot er ikki bundið av teimum tiltøkum, sum nevnd eru í búskaparfrágreiðingini. Tað stendur hvørjum landsstýrismanni frítt fyri at gera uppskot til fíggjarløgtingslóg innan fyri sítt øki. Tað er tó ábyrgd hjá hvørjum landsstýrismanni sær at fáa undirtøku fyri uppskoti sínum bæði í landsstýrinum og Løgtinginum.

Við hesum broytingum tekur meirilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja tað.

**Minnilutin** (Kristina Háfoss, Helena Dam á Neystabø og Eyðgunn Samuelsen) tekur ikki undir við uppskotinum til játtanarkamar fyri 2013.

Vit vilja vísa á, at játtanarkamarnir als ikki viðgera ella loysa tær høvuðsavbjóðingar, ið okkara samfelag og føroyingar hava í dag.

Sum heild manglar eitt yvirskipað mál fyri okkara land, og síggjast ongar visjónir ella bjartar ætlanir í játtanarkørmunum. Hartil kemur, at heldur enn at koma við greiðum boðum upp á loysnir, so eru fleiri dømi í játtanarkørmunum frá samgonguni um átøk, ið gera tær avbjóðingar, ið vit hava enn trupulari at møta.

Vit hava fingið munandi størri gjógv millum láglønt og hálønt við førda politikkinum hjá samgonguni, og heldur enn at gera átøk fyri at minka um munin verða framd átøk, ið økja um munin. Eitt nú við at hækka pensjónsaldurin hjá teimum, ið bert hava fólkapensjón at liva av, og at minka um lestrarstuðulin, og eisini er ætlanin at gera flatskattin enn flatari við at prístalsregulera skattastigan.

Vit hava fólkaminking og stórt arbeiðsloysi, men heldur enn at loysa hesa avbjóðing, so vil samgongan við at økja um pensjónsaldurin 2 ár minka um útboðið av tøkum størvum við heili 1.000 størvum frá 2013-2016. Eisini vil samgongan skerja játtanina til Fróðskaparsetur Føroya og føroyska gransking, ið skuldu verið uppraðfest fyri at fáa fólkavøkstur og framgongd aftur í Føroyum.

Vit hava ovurstóran tørv á nýskipanum innan okkara fiskivinnu og okkara samfelag sum heild. Heldur enn at koma við greiðum boðum upp á nýskipanir, verður sett "politikarar - ásett" tilfeingisgjald á fiski- og alivinnuna, og fólkaatkvøða verður framd um kommunu-samanlegging, uttan at landið vil nýta hesa fólkaatkvøðu til at fremja veruliga nýskipan.

Vit hava stórar avbjóðingar á orkuøkinum í dag, og verða hesar størri komandi árini. Heldur ikki her kemur samgongan við nøkrum uppskotum til loysn.

Vit hava tørv á menning kring allar Føroyar, men heldur enn at gera nakað fyri at fáa hesa, minkar samgongan um túratalið til og úr Suðuroynni og Sandoynni. Heldur einki verður gjørt við eitt nú nýggjan eftirskúla í Suðuroynni ella á Sandoynni, ið kundi skapt framburð og menning.

Vit eiga at gera nógv fyri aftur at fáa vøkstur í Føroyum. Grundarsteinurin undir hesum er álit.

Men heldur enn at skapa neyðuga álitið á politisku skipanina, skapa neyðuga samstarvið breitt í føroyska samfelagnum og geva føroyingum trúnna upp á framtíðina aftur, so vísir samgongan ferð eftir ferð til ein flatskattalætta, ið allir føroyingar hava rindað til umvegis hægri pensjónsskatt, men bert partur av føroyingum fær gagn av. Ein flatskattalætti og pensjónsskattahækking, ið økja munandi um gjónna millum láglønt og hálønt, og sum sjálvt landsstýrið ikki væntar fer at skapa vøkstur – hetta sæst í framskrivingunum av inntøkum landsins, ið vísa nærum ongan vøkstur.

Játtanarkarmarnir áttu at verið grundaðir á eina visjón fyri okkara land, og viðgjørt yvirskipaðu samfelagsmálini og avbjóðingarnar, umframt komið við boðum upp á ítøkilig átøk fyri at møta teimum avbjóðingum, ið okkara samfelag hevur, sum best.

Í staðin er samgongan komin við játtanarkørmum, ið minna um eitt bókhald, har einasta málið er, at botnlinjan skal geva 0 í 2016.

Ikki eitt orð um, hvørjar Føroyar vit skulu hava um 1 ár , 5 ár og 10 ár, og hvørji átøk vit velja at fremja fyri at røkka teimum Føroyum, ið vit ynskja. Tíverri.

Minnilutin vil tryggjar føroyingum einar Føroyar í 2013 og komandi árini, sum stíla fram ímóti fylgjandi 6 málum:

1. Eitt samhaldsfast samfelag fyri allar føroyingar
2. Ein sjálvberandi búskap
3. Fólkavøkstur skal gerast veruleiki aftur
4. Vøkstur og nýskipanir
5. Framtíðartryggjaða umhvørvisvinarliga og burðardygga orku
6. Menning kring allar Føroyar

Fyri at røkka hesum málum skulu ein røð av málrættaðum átøkum setast í verk komandi árini.

Í mun til 2013 – og í mun til játtanarkarmarnar frá samgonguni og viðløgdu frágreiðing – merkir hetta broytingaruppskot m.a.:

1. <u>Eitt samhaldsfast samfelag fyri allar føroyingar</u>

Flatskattalættin verður umskipaður soleiðis, at hesin verður ein skattalætti, ið vendir sosialt rætt, og allir føroyingar fáa gagn av. Barnafrádrátturin skal økjast, og samstundis verður skattalættin býttur út yvir fleiri ár. Sostatt fer skattalættin í 2013 at samsvara við 190 mió. kr.

Pensjónsaldurin skal ikki hækkast.
Hetta merkir, at Almannamálaráðið fær 33 mió. kr. eyka í mun til uppskotið frá samgonguni. Hartil verður mælt til, at ferð verður sett á arbeiðið við at fáa til vega breiða semju um framtíðar føroyska pensjónsnýskipan í samráð við allar partar. Neyðugt er at hava allar partar av nýskipanini við, so ikki bert inngjald verður ásett uttan samstundis at kunna siga, hvussu pensjónsútgjaldið verður mótroknað í fólkapensjón, almannaveitingum v.m.

Fyritíðarpensjónin skal ikki skerjast.
Hetta merkir, at Almannamálaráðið fær 10 mió. kr. eyka í mun til uppskotið frá samgonguni.

Brúkaragjøld skulu ikki setast í verk í heilsuverkinum.

Tí fær Heilsumálaráðið játtan til at tryggja, at so ikki verður.

Skúlatilboð eftir fólkaskúlan skal ikki bert vera fyri nøkur børn og ung í Føroyum. Børn og ung við serligum avbjóðingum skulu eisini fáa bjóðað miðnámsútbúgving eftir fólkaskúlan. Settar verða av 3 mió. kr. til íverksetan av hesum, umframt at taka fleiri inn á Rásina.

Barnaumboð skal setast í verk sum partur av Løgtingsins Umboðsmanni. Hetta fyri at tryggja og verja rættindini hjá okkara børnum. Settar verða av 750.000 kr. til hetta endamál.

Heilsutrygdargjaldið verður frameftir rindað umvegis skattaskipanina. Hetta sparir nógv fyrisitingarliga og skal hartil tryggja, at heilsutrygdargjaldið verður meira progressivt enn í dag. Tey, ið ikki rinda skatt í Føroyum, rinda heilsutrygdargjaldið eins og onnur líknandi gjøld – t.d. ALS-gjaldið.

2. <u>Ein sjálvberandi búskap</u>

Búskaparligt sjálvbjargni verður raðfest høgt. Úrslitið í 2013 verður eitt hall á <u>135,1 mió. kr</u>. Hetta eru 114,4 mió. kr. minni enn hallið hjá samgonguni, ið er 249,5 mió. kr.

Ábyrgd av egnari fyrisiting verður uppraðfest.

Loftrúmið verður yvirtikið. Hetta merkir í 2013 eina meirútreiðslu á 500.000 kr. hjá Løgmansskrivstovuni, men fer vegna økt virksemi í landinum yvir tíð at geva fleiri inntøkur komandi árini.

Útlendingaøkið verður yvirtikið. Hetta merkir, at Innlendismálaráðið verður uppraðfest við 3 mió. kr. til Útlendingastovuna.

Arbeitt verður við at nágreina, hvat skal til fyri, at familju- og arvarættarliga økið verður yvirtikið.

Samgongan ætlar at skerja Kirkjugrunnin í 2014. Minnilutin vísir á, at í sambandi við, at kirkjan varð yvirtikin sum føroyskt málsøki, varð semja gjørd við kirkjuliga landslagið um ikki at skerja játtanina. Henda semja eigur at verða vird.

Søkt verður um føroyskan WTO limaskap.

Landsbanki Føroya og Hagstova Føroya skulu varðveitast sum grundleggjandi stovnar við núverandi nøvnum. Landsbankin skal í enn størri mun tryggjast innlit í føroysku peningastovnarnar og skal leggja seg eftir støðugum tilráðingum og váðametingum av føroyska fíggjargeiranum í mun til føroyska samfelagið.

Sambært frágreiðing til játtanarkarmarnar vil samgongan hinvegin niðurleggja Landsbanka Føroya og petta hann í 3. Flyta óheftar ráðgevar út í Fíggjarmálaráðið, nakrar á Gjaldstovuna (stovnum beint undir landsstýrismanninum) og nakrar í nýggjan stovn, kallaður Telja. Vit vilja harðliga ávara ímóti at niðurleggja Landsbanka Føroya sum óheftan ráðgevandi stovn. Serliga vandamikið er tað at niðurleggja óheftu gjaldførisumsitingina og umsitingina av AMEG, og leggja hesa í stovn beint undir landsstýrismanninum. Hartil skal gjaldførisumsitingin verða partur av ”makroøkonomiskum” umhvørvi, sum ikki er á Føroya Gjaldstovu. Landsstýrisins ætlanir kunnu ávirka okkara rating, rentustøði og seta stórt trýst á

landsstýrismannin um at seta gjaldførið í føroysk áhugamál, heldur enn at seta gjaldførið har, tað samfelagsbúskaparliga er skilabest. Eitt stórt afturstig uttan endamál, tí væntast má, at landsins útreiðslur gerast størri við ætlanini hjá samgonguni.

Føroyar eiga at styrkja sambandið við Bretland. Hetta fer eitt nú at kunna vera viðvirkandi til at skapa nýggj handilssambond og lækka kostnaðarstøðið í Føroyum. Men heldur enn at knýta nærri bond velur samgongan at niðurleggja føroysku sendistovuna í London. Hetta er eitt átak, sum minnilutin ikki tekur undir við.

Samgongan valdi at fara undir at skatta pensjónir við inngjald pr. 1. januar 2012. Samstundis verða allar pensjónir, ið eru uppspardar fram til 31. desember 2011 skattaðar við útgjaldi nú og frameftir. Sostatt hevur landskassin nú inntøkur bæði frá skatti av pensjónsinngjaldi og –útgjaldi. Hetta fer at verða galdandi nøkur ár fram og gevur eina óvanliga dupult-inntøku í eitt tíðarskeið. Stórur vandi er fyri, at landið velur ikki at fremja neyðugu nýskipanirnar í samfelagnum í hesi fyribilsstøðu.

Seinni fer bert skattur at koma frá pensjónsinngjaldi frá teimum, sum eru á arbeiðsmarknaðinum. Vit vita, at tað gerast støðugt fleiri eldri og færri á arbeiðsmarknaðinum, í dag eru um 4 á arbeiðsmarknaðinum fyri hvønn pensjónist, men framskrivingar vísa, at longu í 2020 eru bert 3 og í 2040 bert 2 á arbeiðsmarknaðinum fyri hvønn pensjónist. Nú skatturin er umlagdur frá skatting av pensjónsútgjaldi til inngjald, fara allir pensjónistar í framtíðini ikki at rinda skatt. Samstundis fer tørvurin á eldratænastum at økjast. Hetta má leggjast upp fyri.

Minnilutin mælir til, at inntøkurnar frá skatting av pensjónsinngjaldi verða fluttar í Búskapargrunn Føroya, so hesar inntøkur, ið eru framskundaðar framtíðar skattainntøkur, verða tøkar í framtíðini. Hetta merkir, at 230 mió. kr. í pensjónsskatti verða fluttar í Búskapargrunn Føroya. Hetta ávirkar RLÚ 2 úrslitið, ið gerst 230 mió. kr. verri. Hinvegin verða 230 mió. kr. fleiri í Búskapargrunni Føroya.

Búskapargrunnur Føroya hevur m.a. til endamáls at tálma sveiggjum í føroyska búskapinum og at tryggja samfelagnum og landskassanum gott lánføri. Ásetingarnar í Búskapargrunni Føroya eiga at verða dagførdar soleiðis, at grunnurin í enn størri mun kann virka sum eitt konjunkturútjavnandi amboð. Hetta soleiðis, at møguleiki eitt nú verður fyri at nýta part av innstandandi til at rinda skuld við í niðurgangstíðum.

3. <u>Fólkavøkstur skal gerast veruleiki aftur</u>

Fróðskaparsetur Føroya verður uppraðfest. Heldur enn at skerja við 1 mió. kr., sum samgongan ger, verður játtanin økt við 3 mió. kr., so farast kann undir at skipa fleiri útbúgvingar umvegis fjarlestrarskipanir, og at stovna fleiri útbúgvingar á Fróðskaparsetrinum.

Granskingarøkið verður uppraðfest og skal ikki skerjast. Samgongan hevur valt at taka Føroyar úr ES-granskingarsamstarvinum í 2014 og á henda hátt ”spara” 9,7 mió. kr. Hetta er tó sparing, ið minnilutin metir fer at verða ein stór nettoútreiðsla, tí vit missa vitan, førleikar og ikki minst fólk av landinum. Tí skulu Føroyar framhaldandi vera við í hesum samstarvi.
Í hesum broytingaruppskoti verður lagt upp til, at veita eina játtan á 4 mió. kr. til FarGen, ið er partur av víðarimenningini av Ílegusavninum, so Føroyar kunnu ganga á odda á hesum øki í altjóða høpi.

Fleiri enn 80 ung í Føroyum fara í hvørjum ári av landinum á eftirskúlar. Fleiri av hesum venda ikki aftur. Vit skulu seta á stovn føroyskan eftirskúla, ið kann bjóða føroyingum í og uttanfyri Føroyar nýskapandi eftirskúlatilboð. Sett er av 1 mió. kr. til at fyrireika verkætlanina, so farast kann undir skúlatilboðið í 2014.

Mentanarøkið skal uppraðfestast, tí uttan eina livandi og sterka mentan verða Føroyar ikki landið, har okkara ungu velja at búsetast og skapa í framtíðini. Tí verða 5 mió. kr. settar av til at fara undir prosjektering av nýggjum Tjóðleikhúsi. Samgongan velur at steðga hesi ætlan. Eisini verða 500.000 kr. settar av til Mentanargrunnin at veita filmslist og 300.000 kr. í meirjáttan til Føroya Symfoniorkestur. Samgongan sker annars eisini ymsar játtanir serliga á mentanarøkinum hjá Mentamálaráðnum við 3,3 mió. kr. Hetta er ein skerjing, ið rakar hart, og eigur ikki at verða framd.

Á hvørjum ári fara tíggjutals børn og ung av landinum – ofta saman við allari familjuni – tí vit ikki kunnu bjóða nøktandi tilboð til teirra í Føroyum. Hetta er ikki nøktandi. Heimtøka av tilboðum til føroysk børn og ung við serligum avbjóðingum verður framd í verki. Í dag verða 43 mió. kr. sendar av landinum saman við børnum og ungum hvørt ár. Hesin peningur hevði rokkið langt í Føroyum og hevði skapt virksemi, størv og vøkstur í Føroyum, um rætt varð borið at. Sett verður av 1 mió. kr. fyri at fáa skipaða tilgongd at seta á stovn til tilboð, har hetta kann gerast við fyrimuni í Føroyum.

4. Vøkstur og nýskipanir

Ein fiskivinnunýskipan, ið tryggjar okkara høvuðsvinnu góðar og tryggar kamar at virka innan, er største einstaka átakið, ið kann skapa vøkstur aftur í Føroyum. Neyðugt er við breiðari semju um nýskipanina soleiðis, at talan verður um eina skipan, ið verður verandi komandi nógvu árini.
Andstøðan bjóðar samgonguni, at samgonga og andstøða saman arbeiða við eini fiskivinnunýskipan, og vónandi verður tikið av hesum.

Í hesum broytingaruppskoti verður lagt upp til, at játtanarkarmarnir innihalda tilfeingisgjald – eins og í uppskotinum frá samgonguni. Í alternativu fíggjarlógini fyri 2012 varð lagt upp til í minsta lagi 150 mió. kr. í tilfeingisgjaldi frá markelinum. Í hesum játtanarkørmum fyri 2013 verður lagt upp til, at til ber at fáa í minsta lagi somu upphædd fyri makrelin og møguliga onnur pelagisk fiskasløg umframt í minsta lagi 45 mió. kr. frá øðrum pørtum av fiski- og alivinnuni.
Mett verður, at hesar inntøkur skulu partvíst fáast umvegis uppboðsølu og partvíst sum tilfeingisgjald. Gjaldið eigur ikki at verða tikið av óbýttum, tí tá verður gjaldið lagt yvir á fiskimannin. Hartil verður mett skilabest at halda útróðrarflotan (bólk 4a, 4b og 5) uttan fyri eina skipan við tilfeingisgjaldi.

Færri, sterkari kommunur kunnu gerast lyklaorðið til meira menning kring alt landið. Týðandi er, at vit fáa framt eina skilagóða kommununýskipan í samráð við allar partar. Nú samgongan skrivar út fólkaatkvøðu um kommunusamanleggingar uttan at hava greiða ætlan fyri, hvørji øki skulu leggjast út til kommunurnar, og hvør fígging fylgir við, og hartil uttan breiða politiska viðgerð og undirtøku, er tíverri stórur vandi fyri, at kommununýskipan verður útsett í nógv áratíggir.

Eftir alt ov fáar nýskipanir í áratíggir krevja skúla-, almanna- og heilsuverkið somuleiðis nýskipan og betri samskipan, eins og almenna fyrisitingin eigur at verða skipað av nýggjum

soleiðis, at brúkarin støðugt er í miðdeplinum, og allar óneyðugar dupultfunksjónir fella burtur.
Heldur enn at fremja veruligar nýskipanir ætlar samgongan at fremja sparingar í fólkaskúlanum og heilsuverkinum.

Hetta broytingaruppskot leggur upp til, at møguligur fíggjarligur vinningur við betri samskipan eitt nú í fólkaskúlanum verður latin aftur til menning av okkara útbúgvingum og skúlum.

Eisini verður sparingin hjá samgonguni við at leggja Jarðfeingi og Ferðaráð Føroya saman við eftirlitsstovnum tikin burtur, tí mett verður ikki, at henda ætlan er nóg væl umhugsað, og er ivasamt, um júst hesir stovnar hóska saman.

Hetta broytingaruppskot leggur upp til fleiri íløgur enn uppskotið hjá samgonguni. Umframt tær íløgur, ið samgongan hevur sett á játtanarkarmarnar, verða:

- 5 mió. kr. settar av til at fyrireika Tjóðleikhús
- 5 mió. kr. til Orkugrunn, ið skal stuðla grønum orkuverkætlanum kring Føroyar
- 15 mió. kr. settar av til at byggja nýtt Havrannsóknarskip
- 5 mió. kr. til at fyrireika Hvalbiartunnil
- 4 mió. kr. til at gera seinastu kjarnuboringarnar, ið skulu til fyri at meta um, hvat skal til fyri at gera ein framtíðar Sandoyartunnil, og
- 5 mió. kr. til útgerð til smærri tunnilsverkætlanir.

Hartil verður staðiliga mælt til at seta pening til innbúgv v.m. til Marknagilsdepilin av í seinasta lagi í 2015, soleiðis at hesin kann takast í nýtslu á sumri 2015.

Hetta eru allar íløgur, ið fara at skapa virksemi, trivnað og størri vøkstur.

Eisini mælir minnilutin staðiliga til, at Vinnumálaráðið ger alt fyri at stuðla nýggja Ferðaráðnum og at nýta tíð og orku til at fáa føroysku ferðavinnuna samskipaða og menta til enn eina høvuðsvinnu í Føroyum.

Hetta broytingaruppskot fer at skapa størri vøkstur enn játtanarkarmarnir hjá samgonguni av fleiri orsøkum, nevnast kunnu eitt nú uppraðfesting av útbúgving og mentan, yvirtøka av málsøkjum og umlegging av skattalætta eru millum átøkini, ið fara at skapa størri vøkstur.

5. <u>Framtíðartryggjaða umhvørvisvinarliga og burðardygga orku</u>

Orkuavbjóðingin er millum heilt stóru avbjóðingarnar í føroyska samfelagnum nú og frameftir. Hetta er ein avbjóðing, ið má møtast soleiðis, at vit fáa so umhvørvisvinarliga, grøna og varandi orku sum møguligt. Hetta broytingaruppskot leggur upp til, at játtan verður latin til Orkugrunn, ið skal stuðla grønum orkuverkætlanum kring landið. Hetta eru tó verkætlanir, ið krevja munandi fígging, so neyðugt verður við munandi uppraðfesting av hesum øki komandi árini.

Nú Ísland og Bretland eru í samráðingum um, at leggja el-kaðal úr Íslandi til Bretlands, eigur landsstýrið sum skjótast at taka upp samband við íslendsku stjórnina fyri at fáa Føroyar við í tílíka verkætlan. Hetta hevði tryggjað Føroyum atgongd til ómetaliga stóra nøgd av varandi orku, umframt tryggjað, at Føroyar gerast partur av øllum el-netinum í Europa.

6. Menning kring allar Føroyar

Vit skulu tryggja menning kring allar Føroyar, og fyritreytin fyri hesum eru góð samferðsluviðurskifti. Samgongan velur at gera tað øvugta, nevniliga bæði at steðga øllum forkanningum við framtíðar Sandoyartunli og at skerja túratalið til og úr Sandoynni og Suðuroynni. Hesum tekur minnilutin ikki undir við.

Hetta broytingaruppskot veitir Strandfaraskipum Landsins 2,8 mió. kr. eyka, so túratalið til og úr Sandoynni og Suðuroynni verður varðveitt. Hartil verða settar av 4 mió. kr. afturat til SSL fyri at fara undir tilgongd at javnseta ferðaseðlakostnaðin við skipunum og undirsjóvartunlunum.
Serliga eigur dentur at verða lagdur á, at tryggja teimum, ið hava bústað í Suðuroynni og Sandoynni lægri ferðaseðlakostnað enn í dag.

Hartil leggur hetta broytingaruppskot upp til, at taka undir við tilmælinum frá Rættarnevnd Løgtingsins um at gera seinasta partin av kjarnuboringum lidnar, soleiðis at forkanningar fyriliggja viðvíkjandi einum komandi Sandoyartunli. Undanfarin ár eru nýttar nógvar mió. kr., men enn manglar seinasti parturin. Við 4 mió. kr. afturat kunnu forkanningarnar gerast liðnar. Hetta gevur betri grundarlag fyri at meta um, hvat skal til fyri at gera ein Sandoyartunnil.

Eisini verður í hesum broytingaruppskoti lagt upp til, at 5 mió. kr. verða settar av til keyp av útgerð til at kunna gera smærri tunnilsverkætlanir kring landið. Nógvar smærri bygdir kring landið hava vegaføring, ið skal dagførast í nærmastu framtíð – eitt nú Dalur, Fámjin, Tjørnuvík v.m. Ein máti at gera hetta kann vera, at Landsverk fær tunnilsútgerð og setir saman tunnilstoymi, ið kann arbeiða við hesi útgerð til smærri tunnilsverkætlanir kring landið yvir eitt áramál. Harvið fáa ein røð av støðum dagførda, trygga og nútíðarhóskandi vegaføringar til ein sámuligan kostnað. Eitt nú til Dals, Fámjins, Tjørnuvíkar, Gjáar v.m. Útgerðin kann keypast í 2013, og síðan kann tunnilstoymi arbeiða við hesum verkætlanum kring landið komandi árini.

Eftirskúlin, ið eisini varð umrøddur omanfyri, fer at kunna skapa framburð og menning har, hesin verður – uttan mun um hetta verður í Suðuroynni ella Sandoynni. Føroyar hava alt at vinna og einki at missa við at seta ferð á hesa týðandi verkætlan, og verður tí eisini sett 1 mió. kr. í hesum broytingaruppskoti fyri at fáa gjørt seinastu fyrireikingarnar, soleiðis at eftirskúlin kann gerast veruleiki í 2014.

Aðrar generellar viðmerkingar

- Eingin ivi er um, at stórur partur av hallinum hjá landinum er orsakað av lágkonjunkturið. Nýtslan hjá privatahúsarhaldinum er farin frá 98% av tøku inntøkuni niður í 84%. Hetta merkir, at um nýtslan gerst meira "vanlig" aftur, kemur upp ímóti 1 mia. kr. út í samfelagsbúskapin aftur, herav um 300 mió. kr. mugu væntast at kunna gerast inntøkur hjá landinum og kommunum.

- Hartil hevur Landsbankin upplýst fyri Fíggjarnevndini, at bygnaðarliga hallið er umleið 200 mió. Hetta er vert at hava í huga, áðrenn valt verður at fremja ógvusligar sparingar, sum um at hallið var munandi størri. Bygnaðarliga hallið eigur at fáast

burtur við eini samantvinning av langtíðar nýskipanum og nýggjum inntøkum, ikki stuttskygdum ”hovsa-loysnum”.

- Árið 2011 er seinasta árið, har staðfest tøl eru. Hesi áttu í størri mun at verið grundarsteinurin undir framskrivingum og tilfarinum sum heild.

- Inntøkurnar verða framskrivaðar við nærum ongum vøkstri – undir 1% árliga. Hetta hóast landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur fráboðað, at hann væntar vøkstur. Hvat er veruleikin – framskrivingarnar ella niðurstøðurnar hjá landsstýrismanninum ?

- Landsstýrið ætlar at prístalsregulera skattastigan frameftr. Hetta kemur at fáa stóra ávirkan á inntøkur landsins og at gera flatskattalættan enn flatari. Hetta átak er ikki við í játtanarkørmunum, men fer at ávirka landskassan.

- Landsstýrið tekur ikki øktar útreiðslur av verri rating og hægri rentukostnaði, um gjaldføri landsins frameftir skal umsitast av stovni beint undir landsstýrismanninum. Hetta sambært ætlanum landsstýrisins at avtaka Landsbankan.

- Landsstýrið hevur lagt lóg fyri  Løgtingið, ið inniber, at Almannastovan skal seta um 7 nýggj størv. Játtan til hesi størv er ikki við í játtanarkørmunum hjá landsstýrinum.

- Inntøkur eru við frá leigu av nýggja Havrannsóknarskipinum longu í 2016, hóast hetta ikki verður bygt í valskeiðnum hjá hesi samgonguni.

- Einki yvirlit er yvir, hvørjar upphæddir eru støðlaðar til eina røð av íløguverkætlanum. Tí er ikki greitt, hvussu nógvur peningur í veruleikanum er tøkur til íløgur komandi árini. Tílíkt yvirlit átti at verið partur av tilfarinum.

- Vart skal verða gjørt við, at uppskotið frá landsstýrinum ikki hevur lønarvøkstur 2013 við á útreiðslusíðuni (bert á inntøkusíðuni), og at mett verður, at hetta merkir, at sparast skulu 39,5 mió. kr. hjá tí almenna av hesi orsøk. Hetta átti ikki at verið dult, men upplýst klárt og greitt í tilfarinum frá landsstýrinum.

Tilmæli

Minnilutin vil mæla Løgtinginum frá at taka undir við játtanarkørmunum, soleiðis sum hesir vórðu lagdir fram av landsstýrinum.

Minnilutin mælir í staðin Løgtinginum til at taka undir við broytingaruppskotinum frá minnilutanum.

# B r o y t i n g a r u p p s k o t

**Játtanarkarmar á løgtingsfíggjarlógini fyri 2013**

| **Mió. kr.** | | **Rakstur** | **Løgur** |
|---|---|---|---|
| §1 | Løgtingið | 45,35 | |
| §2 | Løgmansfyrisitingin | 47,3 | 3,0 |
| §3 | Fíggjarmál | 294,3 | |
| §5 | Fiskivinnumál | 149,9 | 15,0 |
| §6 | Vinnumál | 299,4 | 29,5 |
| §7 | Mentamál | 946,9 | 112,0 |
| §11 | Heilsumál | 910,6 | 49,8 |
| §12 | Almannamál | 1.701,9 | 46,7 |
| §15 | Innlendismál | 106,5 | 80,6 |
| Útreiðslur tilsamans | | 4.502,15 | 336,6 |
| **Útreiðslukarmur** | | **4.838,75** | |
| §20 | Inntøkur | 4.703,61 | |
| **Inntøkukarmur** | | **4.703,61** | |
| **RLÚ 1*** | | **-135,14** | *Íroknað skatt av pensjónsinngjaldi |
| **RLÚ 2**** | | **-365,14** | **Uttan skatt av pensjónsinngjaldi |

Við heusm broytingum tekur munnilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til samtykkja uppskotið

**Fíggjarnevndin, 27. apríl 2012**

| | | |
|---|---|---|
| Bárður Nielsen | Kristina Háfoss | Bill Justinussen |
| formaður | næstformaður | |

Jákup Mikkelsen Rodmundur Nielsen Eyðgunn Samuelsen

Helena Dam á Neystabø